# Kreppan merkist hjá

*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*



**Hóast alheimsfíggjarkreppan er við at verða eitt útvatnað orð eftirhondini, so er kreppan tó framvegis ein sannroynd, sum hevur ávirkan á gerandisdagin hjá teimum, ið ætla sær undir lesnað og hjá teimum, ið júst eru liðug við lesnaðin**

## KREPPAN merkist hjá teimum, ið søkja

Donsku universitetini fingu metnógvar umsóknir í fjør. Tíverri fyri summi merkir hetta, at miðaltalið, sum krevst fyri at sleppa inn, hækkar. Kravda miðlatalið verður nevniliga lagt eftir teimum umsóknum, sum koma til hvørt fak sær, og ofta er tað so, at jú fleiri umsóknir eru, jú hægri verður kravda miðaltalið.

Mett verður, at tað í høvuðsheitum eru tvær orsøkir til, at so nógv ung nú søkja inn á universitetini.

Vaksandi arbeiðsloysi millum ung, er ein av orsøkunum. Tað eru eftirhondini nógv ár síðani, at ungdómsarbeiðsloysið hevur verið so stórt í Danmark, og eisini her heima er ungdómurin tann samfelagsbókurin, sum í størstan mun merkir arbeiðsloysi. Hóast tølini fyri ungdómsarbeiðsloysi í Føroyum eru nógv lægri enn tey donsku, so eru arbeiðsloysistølini fyri tey 16-34 ára gomlu relativt høg í mun til eldru arbeiðsføru aldursbólkarnar.

Nýggja bonusreglan, sum loyvir teimum, ið skunda sær víðari undir hægri lestur eftir miðnámsútbúgvingina, at falda miðaltalið á miðnámspróvnum við 1,08, ger, at fleiri fara beint úr miðnámsskúla á hægri lærustovnar. Henda regla sigur nevniliga, at tey, sum søkja inn á víðari lestur innan 2 ár, eftir at tey hava tikið miðnámsprógvið, sleppa at hækka sítt miðaltal, og tað gevur sjálvsagt eitt eyka trýst, tá fleiri av teimum, sum annars vildu bíðað við at lisið víðari, brádliga skunda sær ígjøgnum skipanina.

Í Keypmannahavn hækkaði umsóknartalið til universitetið við 49% frá 2008 til 2009, og eisini í Århus var met sligið í fjør, tá talið av umsóknum til universitetið hækkaði við 37,4% í mun til í fyrraárið.

Nógvu umsóknirnar høvdu við sær, at talið av noktandi svarum uppá umsóknirnar eisini var methøgt í fjør. Hóast umsóknartalið økist, er talið av teimum, sum sleppa inn tó tað sama, tí umstøðurnar og hentleikarnir á lærustovnunum eru bara gjørdir til eitt ávíst næmingatal.

Tí er tað, nú meiri enn nakrantíð, týdningarmikið at hava eitt høgt miðaltal, fyri at betra um møguleikarnar at sleppa inn til júst tað, sum tú droymir um.

## KREPPAN merkist hjá akademikarum

Tíðirnar eru harðar fyri verkfrøðingar, arkitektar, sálarfrøðingar, økonomar og aðrar akademikarar. Danska Akademikarafelagið hevur júst boðað frá, at arbeiðsloysið millum akademikarar nærum er tvífaldað seinasta árið.

Við ársenda í 2008 vóru 4.324 akademikarar arbeiðsleysir, meðan talið í ultimo 2009 var komið heilt upp á 8.245.

Akademikarafelagið undirstrikar, at arbeiðsloysið nú er ein trupulleiki fyri akademikarar í øllum aldursbólkum, tó eru serliga nógvir nýútbúnir akademikarar, sum einki arbeiði hava at fara til.

Felagið óttast, at heilt upp til fimti hvør akademikari kann gerast arbeiðsleysur.

## KREPPAN merkist hjá nýútbúnum

Annarhvør nýútbúgvin arkitektur og triði hvør verkfrøðingur, journalistur og timburmaður eru nú arbeiðsleysir. Hóast allar hurðar stóðu á víðum veggi, tá fólk fóru undir útbúgvingarnar, hevur kreppan endavent øllum og skert møguleikarnar munandi

Cand.scient.pol. og framtíðargranskari, Anne-Marie Dahl, hevur skrivað bókina 'Popstarsgenerationen - nutidens unge, fremtidens arbejdskraft', og sambært henni fer mótgagurin, tey ungu nú fáa, at raka tey hart.

Hetta er nevniliga eitt ættarlið, sum einans hevur upplivað viðgang. Tey hava altíð havt frítt val á øllum hyllum, og eru málrættað farin eftir tí, tey ynsktu sær og vildu hava. Tey eru vaksin upp við tankanum um, at um tú veruliga vilt nakað og arbeiðir hart fyri tí, so eydnast tað. Men nú tey ikki sjálvi hava ávirkan á, hvørt tey fáa arbeiði ella ikki, kann tað fáa stórar avleiðingar fyri tey, t.d. fara vit helst at síggja nógv meiri av strongd og depressjónum í hesum árgangunum.

Vandi er eisini fyri, at hetta ættarliðið púra dettur burturímillum. Tað sær nevniliga ikki út til, at ringa gongdin fer at venda fyribils, so vit mugu helst inn í 2011 ella 2012, áðrenn arbeiði aftur verður til allar hendur.

Men meðan kreppan herjar, koma alsamt fleiri nýútbúgvin út av skúlunum, sum koma við í kappingina um størvini. Og tá arbeiði aftur verður at fáa, verða tey, sum koma beinleiðis út úr skúlunum helst meiri attraktiv at seta í starv, enn fólk, sum hava verið útbúgvin í nøkur ár, men sum ongar arbeiðsroyndir hava, og bara hava gingið heima og fingið arbeiðsloysisstuðul. Tey, sum koma beint frá útbúgvingarstovnunum hava eina dagførda vitan, og tey eru ikki merkt av árinunum av arbeiðsloysinum. Vandi er tí fyri, at fleiri árgangir av vælútbúnum ungum fólki fara at detta burturímillum.